

# Framhaldsskeið í kognitivum amboðum

**- at arbeiða við egnum lívsreglum og sjálvsvirðing**

**Málbólkur >**

Til tín, ið hevur grundvitan innan kogntiv amboð og ynskir at arbeiða víðari við egnari menning í mun til lívsreglur og sjálvsvirðing.

**Endamálið við skeiðnum er >**

At gerast tilvitandi um egnar lívsreglur og mynstur og kunna arbeiða við nýggjum atburði í mun til hvørji virðir hava týdning fyri teg.

**Undirvísarar >**

Undirvísarar eru Jóhanna Andreasen og Oddbjørg Johansen, sum báðar eru sjúkrarøktarfrøðingar við eftirútbúgving innan kognitiva terapi og hava drúgvar royndir innan økið.

**Tíð, stað, kostnaður og tilmelding >**

Skeiðið fevnir um 2 modulir á 2 dagar og verður hesar dagar :

**Modul 1.**
23. og 24. feb. 2011, báðar dagarnar kl. 9.00 - 15.00

**Modul 2.**
30. og 31. mars, báðar dagarnar kl. 9.00 - 15.00

**Kostnaður:** 7.000 kr.

**Luttakaratal:** Í mesta lagi 10 persónar.

**Stað:** Kaffihúsið, Tórshavn.

**Tilmelding >**

Tilmelding fer fram við at senda ein teldupost á johanna@monday.fo **innan 10. februar 2011**.

monday
Tel 226671 ella 258224 www.monday.fo

---

STARVSLÝSING

# Kontrollari til fíggjardeildina á Landsverki

Søkt verður eftir kontrollara til Landsverk at byrja 1. mars ella skjótast til ber.

**Starvið**

Høvuðsuppgávan hjá fíggjardeildini er at fyriskipa og samskipa fíggjarligu viðurskiftini á stovninum og at hava eftirlit við, at innan- og uttanhýsis játtanirnar halda.

Sum kontrollari kemur tú sertakliga at varða av:

- eftirliti við byggiroknskapum
- váðameting av verkætlanum
- eftirliti við avtalugrundarlagi
- eftirliti við faktureringsætlanum
- eftirliti við, at játtanir verða hildnar
- og øðrum fyrifallandi uppgávum á fíggjardeildini

**Førleikakrøv**

Tú hevur viðkomandi hægri útbúgving innan roknskap. Til dømis HD, HA ella cand.merc. Ert tú verkfrøðingur ella líknandi við eftirútbúgving og drúgvum royndum innan roknskap, eru vit eisini áhugað at hoyra frá tær.

Royndir innan oman fyri nevndu uppgávum og/ella innan grannskoðan er ein fyrimunur. Haraftur-at er tað fyrimunur at hava innlit í byggivinnuna, byggilógfrøði og gongdina í byggiverkætlanum.

Tú dugir at varðveita yvirlitið, men evnar eisini at fara niður í smálutir. Tú ert førur fyri at seta kritiskar spurningar umframt at eftirkanna og meta um roknskaparligu mannagongdirnar. Sum persónur ert tú diplomatiskur og samstarvandi. Tú dugir væl at lurta eftir fólki, men tú ert eisini áhaldandi og megnar at skera ígjøgnum, tá tað er neyðugt.

**Setanarviðurskifti**

Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Arbeitt verður skiftitíð.

**Umsóknir**

Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 31. januar 2010, kl. 08.00. Merk umsóknina *„Kontrollari"*.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Árant Andriasson, fíggjarleiðara, á telefon 290 821 ella við at senda ein teldupost til arant@lv.fo

*Landsverk er undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

*Við umleið 140 starvsfólkum er Landsverk ikki bert ein av størstu almennu stovnunum í Føroyum, men eisini millum teirra, sum hevur størstu serfrøðina savnaða undir sama taki.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

SENDISTOVAN